FYLGISKJAL 6

LM-064/2020

UMHVØRVIS- OG VINNUMÁLARÁÐIÐ

Almannamálaráðið
Eirargarður 2
100 Tórshavn
Føroyar

Tórshavn, tann 10. juli 2020
J.nr.: 20/00422-2
At tilskila i svari
Viðgjørt:
Tygara skriv:

Víst verður til uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um Húsalánsgrunn.

Umhvørvis- og vinnumálaráðið hevur fingið nevnda uppskot til viðmerkingar. Í viðmerkingunum til lógaruppskotið sæst, at privat virkandi og húsalánsgrundandi skulu vera á javnsettum grundarlagið viðvíkjandi avkastkravi og atgongd til kommunal grundøkir.

Niðanfyri er ein stutt mannagongd fyri, hvussu støðan er hesum viðvíkjandi í dag. Í kommunustýrislógini § 44 er ásett:

"*Føst ogn hjá kommununi má ikki seljast, uttan so, at ognin frammanundan hevur verið boðin út alment. Landsstýrismaðurin ásetir nærri reglur um mannagongdina við almennum útboði umframt reglur um, at ávísar ognir kunnu undantakast almennum útboði.*"

Við heimild í § 44 er lýst kunngerð nr. 122 frá 22 desember 2000 um alment útboð av kommunalari fastogn. Í kunngerðini hevur landsstýrismaðurin ásett, í hvørjum førum kommunal fastogn ikki nýtist at verða boðin alment út við sølu. Sambært § 2, stk. 1 nr. 1 í hesi kunngerð nýtist kommunal fastogn ikki at verða boðin alment út, tá talan er um sølu til landsmyndugleikar, kommunu ella kommunalan felagsskap.

Í 2013 kom táverandi Innlendismálaráðið til ta niðurstøðu, at søla av kommunalari fastogn til Bústaðir – Føroya Bústaðarfelag - kann javnsetast við sølu av kommunalari fastogn til landsmyndugleikar. Kommunur kunnu tí, smb. § 2, stk. 1, nr. 1 í kunngerðini selja grundøkir til Bústaðir - Føroya Búðstaðarfelag - uttan at ognirnar verða bodnar út alment.

Við prísáseting er útgangsstøðið, at kommunalar fastognir skulu seljast til marknaðarprís, eisini í teimum førum, har fastognin verður seld uttan alment útboð. Hetta skal tryggja, at kommunalar ognir ikki fara til spillis, og at ein ólógligur óbeinleiðis stuðul ikki verður latin einstaklingum, vinnuvirkjum og øðrum gjøgnum sølu av kommunalum ognum.

Ein kommuna kann eisini knýta serligar treytir til søluna av eini ogn, um treytirnar røkja ein sakligan kommunalan áhuga. Hetta er galdandi hóast søluvirðið á ognini hervið verður lægri. Um kommunan selur grundøki við serligum treytum soleiðis at marknaðarprísurin lækkar, skal kommunan tryggja sær, at tann kommunali áhugin verður røktur í samband við søluna og at grundøkini framhaldandi verða nýtt til tað endamál, sum er treytin fyri søluni.

Privat virkandi kunnu ikki keypa grundøki frá kommunum uttan alment útboð, men tað er onki sum forðar kommunum at seta treytir, sum røkja ein sakligan kommunalan áhuga, tá grundøkir verða lýst alment til sølu, sjálvt um hesar treytir gera at marknaðarprísurin væntandi verður lægri.

LM-064/2020

Umhvørvis- og vinnumálaráðið hevur ikki aðrar viðmerkingar.

Vegna Umhvørvis- og vinnumálaráðið

Jónas Tór Næs